# TUNGA

***Microstomus kitt***

**Serføroyskur fiskastovnur**
**Gagnfiskur**
**Botnfiskur**
**Elsta aldursgreinaða tunga undir Føroyum: 24 ár**
**Longsta mátaða tunga undir Føroyum: 56 cm**



## Lívfrøði

Tunga er høgravendur flatfiskur. Hon hevur eina ryggfjøður frá vinstra eyga aftur til klingruna, eina gotfjøður frá gotinum aftur til klingruna, smáar búk- og uggafjaðrar, nógv rundaðan stert og smáar roðslur. Strikan hjá tungu er bert eitt sindur bogin yvir uggafjøðurina. Tunga hevur sermerktan lítlan kjaft við lutfalsliga stórum granum. Kjaftklovin røkkur ikki aftur undir eygað. Tunga er sliputur og smeðin fiskur.

### Útbreiðsla

Tunga er undir Føroyum og Íslandi. Hon er í Hvítahavinum, vestur og suður við norsku strondini, suður í syðra part av Eystarasalti. Hon er í Norðsjónum, runt Bretsku Oyggjarnar og suður í Biskeiavíkina *(Mynd 1)*.



*Mynd 1. Útbreiðsla av tungu.*

Tunga er botnfiskur, sum best dámar harðan botn ella grovan sand. Undir Føroyum er hon frá taraskóginum og út á góðar 200 m. Hon er eisini á Føroyabanka, Ytrabanka og á Ytstabanka. Eftir trolingini á landleiðini at døma er mest til á 100-200 m dýpi eystan fyri Føroyar.

### Vøkstur

Í miðal er 5 ára gomul tunga 25 cm. 10 ára gomul er hon 38 cm, og 15 ára gomul 45 cm *(Mynd 2)*.

Ymiskt er, hvussu tunga veksur ymsastaðni undir Føroyum. Bestur tykist vøksturin at vera í útnyrðingspartinum av Landgrunninum, eisini samanborið við




*Mynd 2. Miðallongd móti aldri, mátað frá rannsóknarskipi í 2022. Víst er á, nær helvtin av tungunum eru kynsbúnar at gýta fyrstu ferð.*

vøksturin aðrastaðni t.d. undir Íslandi og í Norðsjónum. Undir Føroyum er vøksturin minstur á Føroyabanka.

Aldurin hjá tungu verður staðfestur við at telja árringar í nytrunum. Nytran hjá tungu er lutfalsliga lítil *(Mynd 3)*.



*Mynd 3. Nytrur av 7 ára gamlari tungu*

Tungunytran verður lisin í heilum líki av nytru, sum hevur ligið á bloti í vatni í minst eitt samdøgur. Á henda hátt gerast árringarnir sjónskari og lættari at lesa.

Longd móti vekt fyri allar støddir av landaðari tungu sæst í Mynd 4 á síðu 2. Miðalvektin á 35 cm og 50 cm langari tungu í kruvdari vekt í árunum 2015-2022 var ávíkavist umleið 0,5 kg og 1,2 kg.

### Kynsbúning

Kvennfiskar kynsbúnast seinni (4-6 ár) enn kallfiskar (3-4 ár). Í miðal gýtir helvtin av tunguni fyrstu ferð umleið 4 ára gomul; tá er hon um 22 cm til longdar.




*Mynd 4. Longd móti vekt mátað frá landingunum í 2015-2022.*

### Gýting

Gýtingartíðin er frá apríl til september, tó mest mitt um summarið, og hóast meginparturin gýtir norðanfyri, so fer gýting fram allastaðni, har tunga vanliga er.

### Yngul og ungfiskur

Sum hjá øðrum toskafiskum so flotna tey gitnu rogn-kornini og eru at finna ovarlaga í sjónum eins og larvur og yngul *(Mynd 5)*.



*Mynd 5. Tunguyngul fingin við rannsóknarskipinum Magnusi Heinasyni á yngultúri síðst í juni, har trolað varð uppi í sjónum.*

Tá yngulin er um 25 mm langur, leitar hann móti botni frá grunnum vatni og út á einar 150 m dýpi.

### Ferðing

Tunga er støðufastur fiskur, sum ikki ferðast víða. Merkingarroyndir undir Føroyum vóru gjørdar í 1930'unum av m.a. tungu, har ábendingar vóru um, at tungan inni á firðunum verður verandi har, men at tunga úti á Landgrunninum og bankunum kann ferðast ímóti høvuðsrákinum; tað er kring Føroyar ímóti klokkuni. Bert ein einkult tunga í hesum merkingarroyndum ferðaðist tvørtur um sjóvarfalsfrontin. Óvist er, um hesar royndir eru tengdar at árligari ferðing á gýtingarøkið.

### Føði

Føðin hjá tungu ber merki av, hvar tunga heldur til, og eisini hvat hon er før fyri at eta við lítla kjaftinum. Einamest etur hon bustormar *(Mynd 6)*, sum hon finnur millum sandkornini. Tunga etur tó eisini m.a. lítlar kræklingar, slangustjørnur og ymisk smá krabbadjór. Hildið verður, at tunga niðursetur evnaskiftið um veturin tá smáfongt er, og møguliga fer hon heilt í vetrardvala.




*Mynd 6. Føðin í vekt í tungumagum býtt í høvuðsbólkar árini 2020-2022.*

## Veiða

Heildarveiðan av tungu undir Føroyum síðani 1903 er víst á Mynd 7. Við jøvnum millumbilum hevur veiðan verið um 1.000 tons, men er síðani minkað aftur. Miðalveiðan síðstu øldina hevur verið um 750 tons. Mest varð fiskað fyrst í tríatiárunum, um 2.000 tons.




*Mynd 7. Heildarveiðan av tungu undir Føroyum 1903-2022 í rundari vekt.*

Einki tíðarskeið síðani fyrst í tjúguárunum hevur so lítið verið fiskað av tungu sum árini 2011-2018.

Í dag er tað einamest trolbátarnir í bólki 4T, sum fiska tungu við beinleiðis fiskiskapi eftir flatfiski á landleiðini um summarið. Tunga verður tó eisini fiskað sum hjáveiða hjá partrolarunum og útróðrarbátum við línu.

Longdarbýtið í tunguveiðuni undir Føroyum í 2022 er víst á Mynd 8. Meginparturin av tunguni í veiðuni var yvir 34 cm langur. Miðallongdin var umleið 36 cm.

Á landingarmiðstøðunum kring landið verður tunga bólkað í tríggjar støddarbólkar, alt eftir vekt (Talva 1).




*Mynd 8. Longdarbýtið í tunguveiðuni undir Føroyum í 2022.*

| | Kruvd vekt (kg) | Aldur (ár) | Longd (cm) | Búgvin |
|---|---|---|---|---|
| Stødd 1 | 1,0+ | 8-12+ | 42-47+ | 95-100% |
| Stødd 2 | 0,5-1,0 | 6-10 | 35-42 | 75-98% |
| Stødd 3 | <0,5 | 5-8 | 30-35 | 50-90% |

*Talva 1. Umrokningartalva út frá støddarbólkum. Virðini byggja á tøl fyri árini 2014-2022. Aftasta kolonnan sigur, hvussu stórur partur av fiskinum í ymsu støddarbólkunum væntandi hevur gýtt minst einaferð.*

## Stovnsmeting

Ongin stovnsmeting verður gjørd fyri tungu við Føroyar. Tøl frá ”veiðu upp á roynd” (cpue) kunnu nýtast til at geva eina ábending um, hvussu støðan er hjá stovninum í føroyskum øki.

Tá Havstovan ger yvirlitstrolingar á Landgrunninum um várið og summarið, fæst tunga sum hjáveiða. Hendan cpue-serian síðani mitt í 1990'unum vísir sum heild lítlar broytingar í stovnsstøddini *(Mynd 9)*. Í árunum 2000-2002 var ein stórur vøkstur í veiðuni, eins og í 2017-2018. Hesi árini vóru eisini sermerkt fyri aðrar fiskastovnar og vistskipanina á landgrunninum.




*Mynd 9. Veiða upp á roynd av tungu á yvirlitstrolingum á Landgrunninum hjá rannsóknarskipinum hjá Havstovuni um várið (1994-2022) og um summarið (1996-2022).*


**Keldur**

**Mouritsen, R. 2007.** *Fiskur undir Føroyum*

**Jákupsstovu, S. H. í, 2004.** *Fiskiskapur við Føroyar í 100 ár.* Úrdráttir úr hagtølum frá ICES.

**Rae, B.B. 1965.** *The Lemon Sole*. The Whitefriars Press Ltd, London.

**Tåning, A. V. 1943.** *Fiskeri- og Havundersøgelse ved Færøerne.* Skrifter udgivet af Kommissionen for Danmarks Fiskeri- og Havundersøgelser. No. 12.


Ábyrgdarfrøðingur: Hannipoula Olsen